Fylgiskjal 12

LM-016/2023

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe

Fra:	Betzy Ludvig
Sendt:	15. juni 2023 09:02
Til:	Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
Emne:	SV: TIL UMMÆLIS - Uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)

Hey Gudrun,

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið. Eg havi sent uppskotið til Vørn til viðmerkingar, og biðið Vørn senda viðmerkingar beinleiðis til tín.

Blíðar heilsanir / Kind regards

Betzy Ludvig
Løgfrøðingur
Fartelefon: +298 267703
Betzy.Ludvig@fisk.fo

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Fisheries and Infrastructure

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ
Yviri við Strond 15 / FO-110 Tórshavn / Føroyar
Tel. +298 353030 / fisk@fisk.fo / www.fisk.fo

Fra: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@lmr.fo>
Sendt: hósdagur, 8. juni 2023 12:19
Til: VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>
Emne: TIL UMMÆLIS - Uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)
Prioritet: Høj

Uppskot til broyting í revsilógini (Almennur partur) verður við hesum sent tykkum til ummælis.
Freistin at lata inn ummæli er mánadagin 17. juli.

Hjáheft verður uppskot til broyting av almenna partinum (kap. 1-11) í revsilógini sent tykkum til ummælis. Kapitlarnir eru um hesi evni: Innleiðandi ásetingar, vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar, treytir fyri revsingarbari, brotsroynd og viðvirkan, revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar, revsingarnar, treytað fongsulsrevsing, samfelagstænasta, aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini, at áseta revsing og uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini

Lógarteksturin er annars í høvuðsheitum umsettur til føroyskt, umframt at ávísar grundleggjandi broytingar eru gjørdar.

Av tí at tit í stóran mun hava eftirlitsstovnar undir tykkum, hevði verið gott, hóast lítlar og ongar broytingar eru gjørdar, um tit kundu hugt eftir hesum ásetingum:

- Kapittul 6: §§ 50 – 55 (sekt)
- Kapittul 9: §§ 75 – 79 (inndrátt og frádøming av rættindi)
- Kapittul 11: Fyrning